# FYLGISKJAL 1

Løgtingsmál nr. 100-28/2003

## Hugtøk viðvíkjandi skattatrýsti og samanbering av skattatrýsti í Føroyum og Danmark

***1. Vanliga skattatrýstið***

Tað er rættiliga ymiskt hvussu skattatrýstið verður gjørt upp í ymiskum londum, og tí skulu samanberingar av gongdini í skattatrýstinum millum lond gerast við fyrivarni. Tann mest vanligi uppgerðarhátturin, ið verður nýttur í altjóða samanberingum er, at allir skattir og øll avgjøld verða roknað í mun til BTÚ í marknaðarprísum, og tað verður gjørt soleiðis:

$$\frac{\text{Skattir og avgjøld}}{\text{BTÚ í marknaðarprísum}} \text{ x } 100$$

Um vit síggja burtur frá tíðarskeiðnum frá 1993-1996, tá føroyski búskapurin var kreppuraktur, so sæst í fylgiskjali 2, at vanliga skattatrýstið í Føroyum altíð hevur ligið undir tí tilsvarandi danska.

***2. Korrigeraða skattatrýstið***

BTÚ er samlaða framleiðslan í samfelagnum frádrigið rá- og hjálpievni. BTÚ vísir sostatt ikki hvussu stór inntøkan í samfelagnum er. Um allar inntøkuflytingar (netto) millum innlandið og útlandið verða lagdar afturat BTÚ fæst tøka bruttotjóðarinntøkan í marknaðarprísum (*t*BTI). Um allir skattir og øll avgjøld verða rokna í mun til *t*BTI, sæst, hvussu stóran part av tøku bruttotjóðarinntøkuni tað almenna leggur hald á við skattum og avgjøldum. Hetta verður nevnt *tað korrigeraða skattatrýstið* og verður roknað soleiðis:

$$\frac{\text{Skattir og avgjøld}}{t\text{BTI í marknaðarprísum}} \text{ x } 100$$

Fylgiskjal 2 vísir okkum, at tað korrigeraða skattatrýstið í Føroyum altíð hevur ligið undir tí tilsvarandi danska.

***3. Modifiseraða skattatrýstið***

Modifiseraða skattatrýstið vísir, hvussu stóran part av tøku bruttotjóðarinntøkuni í samfelagnum tað almenna hevur at ráða yvir til umsiting og tænastur. Tøka almenna bruttoinntøkan er eitt slag av nettoskatti, sum vísir, hvussu nógv borgarirnir gjalda av almennu nýtsluni, løgunum og samansparingini. Tøka almenna bruttoinntøkan tekur hædd fyri, at ein stórur partur av skatta- og avgjaldsinntøkunum hjá tí almenna umsitingar- og tænastusektorinum fer aftur til borgarirnar sum inntøkuflytingar til húsarhaldini og stuðul til vinnulívið. Við øðrum orðum svarar munurin millum tað korrigeraða skattatrýstið og tað modifiseraða skattatrýstið til tann partin av skattinum og avgjøldunum, sum tað almenna krevur inn, umfordeilir og síðan rindar út aftur sum inntøkuflytingar og stuðul av ymsum slag. Modifiseraða skattatrýstið verður roknað soleiðis:

$$\frac{\text{Tøk almenn bruttoinntøka}}{t\text{BTI í marknaðarprísum}} \text{ x } 100$$

Modifiseraða skattatrýstið í Føroyum hevur síðani 1993 verið hægri enn tað tilsvarandi danska. Tað er vert at viðmerkja, at høvdu føroyingar sjálvir rindað fyri løgreglu, rættarskipan, sjóverju, uttanríkistænastu o.s.fr., so hevði modifiseraða skattatrýstið í Føroyum verið enn hægri enn tað er nú.

At tað korrigeraða skattatrýstið í Danmark er hægri enn í Føroyum, og at tað modifiseraða er lægri, merkir í fyrsta lagi, at tað almenna í Danmark krevur meira inn við tí endamáli at umfordeila. Í øðrum lagi merkir hetta, at nýtslan (t.d. lønir), løgurnar og samansparingin (avlopið) í almenna sektorinum í Føroyum er størri enn í Danmark.